# FUNDARBÓK HJÁ
# VÁGS BÝRÁÐ 2015

<table>
<tr><td colspan="2">Fundur nr. 3<br>Tíð: 30. mars 2015 kl. 19.00<br>Stað: Kommunuskrivstovan</td><td>Skrivari: Petry Joensen</td></tr>
<tr><td>Fastir fundardagar:<br>26. januar, 23. februar, 30. mars,<br>27. apríl, 01. juni, 29. juni<br>24. august, 28. september,<br>26. oktober, 30. november,<br>14. desember</td><td>Møttir:<br>Allir býráðslimir uttan<br>Heri Hjelm</td><td>Ikki á Fundi:<br>Heri Hjelm, fráboðað</td></tr>
</table>

Heri Hjelm hevur 26. mars 2015 boða frá at tað ikki liggur fyri hjá honum at møta á býráðsfundinum í dag 30. mars 2015. Olgar Mortensen sum er næsti maður á listanum er somuleiðis burturstaddur, Páll Lervig triði maður á listan er møttur til fundin, býráðið skal samtykkja at hann tekur sætið fyri Heri Hjelm.

Einmælt samtykt

## 1) Mál nr.: 14/00257 Skipan av Eldrabústaðum

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin greiðir frá hvat Stýrið fyri Bú- og heimatænastuna arbeiðir við.

**Avgerð:**
Kunnað.

## 2) Mál nr.: 15/00055 Keyp av bjargingarbáti, seinna viðgerð av eykajáttan

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram til seinnu viðgerð eykajáttan til keyp av bjargingarbáti til bjargingarliðið í Sunnaru helvt.
Býráðið samtykti til fyrru viðgerð á fundi 23. februar at taka undir við at keypa bjargingarbátin og veita eykajáttan til íløguna.

Fíggjarleiðarin mælir til at eykajáttanin verður 140.000,00 kr. og at eykajáttanin verður fíggja av innistandandi.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt til aðru viðgerð, at játta 140.000,00 kr. í eykajáttan av innistandandi.

Undirskriva:

**3) Mál nr.: 15/00060 Umsókn um at víðka garagu – frávik frá byggisamtykt**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram áheitan frá teknisku nevnd. Nevndin hevur á fundi 16. mars 2015 viðgjørt umsókn frá Ólavur Emil Olsen, um víðkan av garagu. Av tí at stykkið er undir 300 $m^2$ , samtykti nevndin at leggja málið fyri býráðið til støðutakan, við tilmæli um at játtað umsóknini.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at taka undir við Teknisku nevnd.

**4) Mál nr.: 14/00284 Umsókn um byggiloyvið til uppíbygging matr. nr. 408 – frávik frá byggisamtykt**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram málið viðv. uppíbygging á matr. nr. 408. Grundøkið er undir 300 $m^2$, sambært løgfrøðingi er endamálið við ásetingin um at tað ikki skal byggjast á stykkjum, sum er smærri enn 300 $m^2$, ikki at hindra bygging í gomlum býarpørtum og á hendan hátt hindra at gomul hús verða nútímansgjørd.
Grannin hevur givið loyvið til hesa uppíbygging.
Áheitan er send til Vágs býráð um at loyva frávik í byggisamtyktini, soleiðis at innsenda umsókn um uppíbygging á matr. nr. 408 verður gingin á møti.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at játta byggiloyvið til uppíbygging, og geva frávik frá byggisamtyktini.

**5) Mál nr.: 15/00082 Áheitan um at leiga øki fram við Laksá matr. nr. 490 l,i,g,d,e**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram áheitan undirskrivað av Hjalmar Magnussen, Suðursmíð, sum vegna eigarafelag undir stovnan søkir um at leiga matr. nr. 490 l,i,g,d,e.
Tekniska nevnd viðgjørdi hetta á fundi 16. mars og samtykt var at leggja málið fyri býráðið, við tilmæli um at játta umsóknini.
Harumframt verður heitt á býráðið um at leggja matriklarnir saman, so leigumálið bert fevnir um ein matrikul.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at taka undir við Teknisku nevnd.

Undirskriva:

**6) Mál nr.: 14/00078 Umsókn um byggiloyvið til summarhúsini við Laksá**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmælið frá Teknisku nevnd. Nevndin hevur á fundi 13. mars einmælt samtykti at ganga umsóknini frá Suðursmið(vegna eigarar) um byggiloyvið til 10 summarhús við Laksá á møti.
Tekniska nevnd leggur málið fyri býráðið við tilmæli um at játta byggiloyvi sambært serstakari byggisamtykt á økinum.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at taka undir við Teknisku nevnd.

Undirskriva: